# 90 sangarar á uttanlandsvitjan



**Ebenezer:** Í hesi vikuni fóru 90 spentir sangarar úr kórinum í Ebenezer í Havn á ta longu leiðina til Ísraels. Her er ætlanin at tey skulu vitja um páskirnar í ár.

Men tey gjørdu tó ein avstikkara á vegnum til Ísraels, og bjóðaðu til konsert í Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn fríggjakvøldið.

Tað forvitnisliga við hesi framførsluni er, at Ebenezerkórið fer at syngja sangir á ikki færri enn trimum málum – føroyskum, enskum og á hebraiskum.

# Føroyskir og útlendskir talarar

**Í Skálafirði:** Aftur í ár verður páskastevna hildin í Kelduni. Evnið í ár er "Tað er fullgjørt".

Í ár verða bæði føroyskir og útlendskir talarar, eins og vitjanir úr Svøríki og Ísrael.

Úr Svøríki kemur Carl Gustav Severin. Hann er ein virðismettur og lívligur prædikumaður. Hansara opna lyndi og hjarta nemandi boðskapur bera við sær, at fólkið gevur boðanini gætur. Hann hevur prædikað í 35 ár, og síðan 1990 hevur hann verið í tænastu hjá Livets Ord.

Israel Pochtar er fyrstipastorur í samkomuni Beit Hallel í Asdod, Ísrael, og eisini er hann stovnari og leiðari av felagsskapinum Voice of Judah Ministries, sum hevur ábyrgd av sjey samkomum í ymiskum býum í Ísrael.

Hann er ein týdningarmikil leiðari í rørsluni hjá teimum messiansku trúgvandi í Ísrael. Israel Pochtar býr saman við konu síni, Victoriu, og trimum børnum, í Asdod.

Tað verður nógv ymiskt tiltøk á páskastevnuni. Á skránni verða m.a. ungdómkvøld, syngi við kvøld, ymisk seminar, barnamøtir og annað.




**STEVNA**

*Nógvur sangur verður á ársins páskastevnu í ár*

# Sangløta við yrkingum



**Sørvágur:** 2. páskadag klokkan 16 verður sangløta í Sørvágs kirkju.

Hetta verður ein heldur øðrvísi sangløta, tí sungnir verða sálmar úr Sálmabókini og yrkingar eftir Holgar Jacobsen. Hesin sami Holgar fer eisini at syngja og spæla saman við Tórfríð Tausen og John Edvin Joensen.

Sangløtan minnir hóast alt um eina vanliga gudstænastu, tó við einstøkum broytingum. Tað verður ringt bæði inn og út, eins og tveir felagssálmar verða sungnir sum sóknarpresturin í økinum, David Johannesen hevur yrkt.

# Felags stevna fyri alla oynna

**Kambsdalur:** Evnið fyri páskastevnuna í Eysturoy, sum hesaferð verður í høllini á Kambsdali, er: "Tað er fullgjørt!".

Stevnan byrjar páskaaftan 23. apríl og endar 2. páskadag, 25. apríl. Møti vera hvørt kvøld klokkan 19, har Hanus á Gørðum, Andreas Andreasen og Torleif Johannesen fara at tala.

Evnið fyri páskastevnuna í ár er eitt av seinastu orðum Jesusar á krossinum, tá ið hann sigur: "Tað er fullgjørt!".

Nógvar sangframførslur verða eisini á møtunum, og fara tvey kór, ella kór og einstaklingur at framføra á hvørjum av møtunum. Talan er um KFUM&K kórið, Taborkórið, Bethaniakórið, Glyvrakórið, Manskórið í Thabor og Tórhild Bjarkhamar.




Á páskastevnuni verður eisini eitt stórt ungdómstiltak við lovsangsløtu páskaaftan, eins og eitt stórt familjumøti seinnapartin páskadag fyri alla oynna.

Tað eru missiónsarbeiðini í Eysturoy, sum skipa fyri páskastevnuni á Kambsdali. Í ár hava tað serliga verið arbeiðini í Fuglafirði, Leirvík og í Gøtu, sum skipa fyri. Í fjør var stevnan í Runavík og í fyrraári á Skála.

## Páskir í Frelsunarherinum

**Havn:** Aftur í ár verða páskamøtir hildin í Frelsunarherinum í Havn.

Møtini byrja skíriskvøld og halda fram til 2. páskadag. Á møtunum luttaka føroyskir talarar.

Páskadag verður serstøk skrá. Tá verður longu byrja klokkan 8 á morgni við páskafrøi, og síðani verður farið út á Landssjúkrahúsið, har hátíðartónar verða spældir.

## Felags gudstænasta í Oasuni

**Hoyvík:** Á 6. sinni verður skipað fyri felagskirkjuligari gudstænastu 3. páskadag í Oasuni. Talan er um eina ríka og fjølbroytta gudstænastu, við luttøku frá ymiskum samkomum og kirkjum. Nógvur sangur, saman við talu, bøn og upplestri verður á skránni á hesari gudstænastu.

Millum annað luttaka Frelsunarherurin, Evangeliihúsið og Oasan við sangi. Katólska kirkjan og Adventkirkjan luttaka við upplestri. Heri Joensen frá Vesturkirkjuni lesur aronitisku signingina og leiðir í Faðir Vár, meðan dómprósturin, Uni Nes, ið umboðar Dómkirkjuna, talar á hesi felagskirkjuligu gudstænastuni. Aftaná gudstænastuna verður kaffiborð.

Gudstænastan í Oasuni byrjar kl. 19.30.

